








# *Rokoko hevur tilboð alla vikuna*



**Tann 8. desember er 22 ára føðingardagur hjá Rokoko í Norðragøtu, og tí hevur handilin góð føðingardagstilboð alla vikuna**



Tað var 8. desember í 1988, at handilin Rokoko varð settur á stovn. Tá var handilin í Syðrugøtu og seldi gávulutir, so sum stell og annað. Tá kreppan seinni kom, merktist hetta væl, og lagt var um til at selja klæðir. Og væl gekk. Handilin flutti eisini til Norðragøtu.

Rokoko hevur víðkað alla tíðina og hevur nú øll húsini, har tey halda til.

## Til øll

Í Rokoko eru klæði at fáa til bæði menn og kvinnur, og til allar aldursbólkar; baby og ung og eldri.

Tað byrjaði í smáum, men í dag eru 4 í føstum starvi, meðan eini 3 harumframt eru knýttar at handlinum.

## Galla

Skal nakað nevnast, sum er serstakt fyri Rokoko, og sum tey hava gjørt sera nógv við seinnu árini, so eru tað gallakjólar.

Tey ungu eru fín, tá tey fara í veitslu, til dømis tá fótbóltur, hondbóltur, kappróður ella annað er liðugt. Og í Rokoko hava tey bæði úrvalið og royndirnar á hesum økinum.

- So tað er bara at leggja leiðina framvið, siga tey í Rokoko.

## Jólini nærkast

Í Rokoko merkist, at jólini eru í hondum. Tey eru komin í jólahýr og hava úr at gera. Og í føðingardagsvikuni eru góð tilboð í Rokoko.